Fróðskaparsetur Føroya

1. september 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 6/2006

Tíð: Hósdagin 31. august 2006, kl. 13-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eivind Weyhe, vararektari og megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 5/2006 setursráðsfundi 22. juni 2006.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Endurskoða fíggjartøl 2006.** (J.nr. 0015-01595). Setursskrivarin heitti á setursráðið og deildirnar um at endurskoða fíggjartørvin, nú seinna lestrarhálva er byrjað og studentatalið kent. Freistin at lata setursskrivstovuni dagførd tøl er 20. september.

4. **Altjóða summarskeiðið.** (J.nr. 0041-01883). FMD heitti á setursráðið um at taka málið um summarskeið uppaftur, serliga v.v. fíggjarligu kørmunum. Setursráðið samtykti at staðfesta tilmælið frá arbeiðsbólki, dagfest 6.1.06. har tað m.a. er ásett at ein deild, sum skipar fyri longri skeiði eftir umsókn skal fáa játtað pening til skrivstovuhjálp og at setrið dekkar eitt møguligt hall, um luttakarar melda frá í seinastu løtu.

5. **Lestrarársbyrjan 2006.** (J.nr. 0040-01882). Á Náttúruvísindadeildini byrjaðu nýggju studentarnir 28. august, á hinum deildunum verður byrjað 4. september. Deildirnar skipa fyri ymiskum innleiðslutiltøkum. Setursskrivstovan skipar fyri felags

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

tiltaki í Loftsstovu hósdagin 7. september, har kunnað verður um ymisk viðurskifti. Aftaná verður ábit.

6. **Val av studentaumboðum í megindeildarráðini lestrarárið 2006/07. Valnevnd.** (J.nr. 0011-01887). Setursráðið samtykti at heita á Turið Sigurðardóttir og Eyðfinn Magnussen um at halda fram í valnevndini og á Jákup Sørensen sum formann umboðandi setursskrivstovuna. Heitt verður á valnevndina um at skipa fyri vali av studentaumboðum sambært valreglunum.

7. **Talgildar rokningar. Gjaldstovan skrásetir allar innkeyparar í FSL-skipanini.** (J.nr. 0015-01888). *Fundarskjal: Teldubræv frá Gjaldstovuni, dagfest 5.7.06* Setursskrivarin kunnaði um málið. Heitt verður á allar deildir um at geva setursskrivstovuni eitt fullfíggjað yvirlit yvir, hvørji kunnu keypa inn fyri deildirnar.

8. **Innbjóðing frá Altjóða Skrivstovuni til at luttaka á útbúgvingarráðstevnuni "Markleys útbúgving", sum verður 28. september 2006 umborð á Smyrli.** (J.nr. 0056-01889). Samtykt at biðja eitt vísindafólk saman við Jákupi Sørensen umboða Fróðskaparsetrið til tiltakið.

9. **Búskaparráðið. Áheitan frá Fíggjarmálaráðnum um tilmæli til lim í ráðið fyri Poul Geert Hansen.** (J.nr. 0011-01742). Setursskrivarin legði fram uppskot til tilmæli við trimum fólkum við einum eyka umboði, um onkur ber seg undan. Setursráðið tók undir við tilmælinum. Setursskrivarin avgreiðir málið.

10. **Status á KT-økinum.** (J.nr. 0038-01895). Setursskrivarin kunnaði um gongdina í sambandi við umleggingar av internettænastuni frá Føroya Tele til EITT. Arbeiðið varð seinkað av orsøkum, vit ikki kundu stýra, og hetta skapti órógv fyrst í august mánaði, men nú er mesta komið í fasta legu. Greitt varð frá kostnaði av umlegging og kostnaði av nýggju tænastuni í mun til gomlu. Í hesum sambandi varð nevnt uppskot frá KT-tænastuni um at seta upp tráðleysa útgerð so allir studentar, starvsfólk og vitjandi kunnu fáa atgongd til internet á Trønni við egnum teldum. Hetta tók setursráðið fult undir við og heitti á KT-tænastuna um at kanna málið nærri og gera eina meting av kostnaði. Eisini varð kunning frá KT-tænastuni um netið í Reins Húsi, sum er óvirkið og ikki kann gerast aftur. Teldurnar í húsinum eru eisini sera gamlar. Semja um, at í fyrsta umfari er einans neyðugt at tryggja internetsamband við tráðleysari útgerð. Umboð fyri Søgu- og samfelagsdeildina og Føroyamálsdeildina mugu síðani saman við KT-tænastuni taka støðu til, hvat skal gerast við netspurningin.

11. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundir á Føroyamálsdeildini 6.7.06 og 30.8.06.** (J.nr. 0011-00011).
    b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 6.7.06.0** (J.nr. 0011-00013).
    c. **Kunning um arbeiðið í bólkinum, sum ger uppskot til nýggja lóg og nýggjan bygnað fyri Fróðskaparsetrið.** (J.nr. 0010-01822). Setursskrivarin

kunnaði um arbeiðið higartil í bólkinum. Heitt varð á setursráðslimirnar um at kunna starvsfólkini á deildunum.

d. **Kunning frá fundi í NUAS stýringsbólkinum 23. 8.06.** Setursskrivarin kunnaði um, at tað er endaliga avgjørt, at Universitetsstjórarnir o.o. í NUAS koma til Føroya á ráðstevnu í august 2007. NUAS er vertur og hevur ábyrgd av fakligu skránni, meðan setursskrivsstovan skipar fyri ráðstevnuni.

**Avgreiðslumál:**

12. **Góðkenning av lestri sum síðufak til cand.mag.-prógv. Føroyamálsdeildin mælir til, at Pauli Guðjónsson fær *Grundfag i filosofi* 120 ECTS frá Aarhus Universitet góðkent sum síðufak til cand.phil.-útbúgvingina í norðurlendskum, soleiðis at hann fær cand.mag.-prógv. At góðkenna.** (J.nr. 0040-01883). Góðkent.

13. **Námsskipanir fyri B.A. í føroyskum og M.A. í føroyskum, sum eru góðkendar av megindeildarráðnum á Føroyamálsdeildini 31.5.06, at staðfesta.** (J.nr. 0041-01367). Staðfest.

14. **Góðskriving. Føroyamálsdeildin mælir til, at Eyðbjørg Fossádal fær góðskrivað høvuðsritgerð og kandidatfyrilestur, sum hon hevur staðið við Københavns Universitet, fyri høvuðsritgerð 28 ECTS og kandidatfyrilestur 2 ECTS á Cand.phil.lestrinum í norðurlendskum. At góðkenna.** (J.nr. 0046-01894). Góðkent.

**Kunningarmál:**

15. **Mánaðarjavni ultimo juni 2006, nýtsla fyri alt setrið 8.547.800 kr = 44,8% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).

16. **Upptøka lestrarárið 2006/07: 22 til B.A. í føroyskum og 2 til stakgreinar í føroyskum, 19 til B.A. í søgu, 36 til B.S.Sc. í stjórnmálafrøði, 5 til B.Sc. í lívfrøði og 2 til stakgreinar í lívfrøði.** (J.nr. 0040-01758).

17. **PLÚ Pedagogútbúgving Læraraútbúgving, Mentamálaráðið 2006. Frágreiðing og tilmæli frá arbeiðsnevndini, sum mentamálaráðharrin setti at endurskoða útbúgvingar av lærarum og pedagogum.** (J.nr. 0011-01099).

18. **Útgávur:**
    a. **Beinta í Jákupsstovu: "Kunnskap og makt. Færoysk helsepolitikk gjennom 150 år".** ***Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* hevur latið stuðul til útgávuna.** (J.nr. 0073-01087).
    b. **Ársfrágreiðing 2005, Fiskirannsóknarstovan.**
    c. **Årsrapport 2005, Aarhus Universitet.**
    d. **Årsberetning 2005, Danmarks Pædagogiske Universitet.**

e. **TemaNord 2006:517 “Nordic sivic society organisations and the future of welfare services”, TemaNord 2006:520 “Välfärdspolitiska förhållanden i Västnorden”, Norðurlandaráðharraráðið.**
f. **Report 2006:29R “International Postgraduate Students Mirror. Catalonia, Finland, Ireland and Sweden”, Högskoleverket, Svøríki.**

Frágreiðing: Annika Sølvará